# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Populisma og rúsdrekkasøla

Rúsdrekkamálið hevur mangan elvt til rumbul á tingi. At vit hava havt - og framvegis hava – eina so stranga rúsdrekkalóg, samanborið við grannalond okkara, hevur sjálvandi sína søgu, sum gjørdi, at kvinnurnar atkvøddu eitt rúsdrekkaforboð ígjøgnum í 1907.

Men nógv vatn er runnið síðani tá. At Rúsdrekkasøla Landsins varð skipað í 1992 var tí eitt náttúrligt stig. Fleiri mæltu til fría rúsdrekkasølu, men tað var samfelagið neyvan klárt til tá - og so als ikki tann politiska skipanin. Tí var hetta tann gylti millumvegurin tá. Nú eru skjótt 20 ár liðin, og sera nógv er broytt. Býarlív og matstovur eru nú ein náttúrligur partur av samfelagnum – og føroyingar eru farnir at drekka veikaru sløgini av rúsdrekka, ikki minst hevur vínið tikið fremsta plássið frá sterka brennivíninum.

Um dagarnar kom í ljósmála, at Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, við kunngerð hevur givið Rúsdrekkasølu Landsins loyvi at hava opið leygardag. Mong mundu yppa øksl, tá hesi tíðindi bórust, tí hvør var tann djúpara meiningin við hesum? Uppskot hava verið á tingi um at javnseta føroysk virki við útlendsk virki, ið framleiða rúsdrekka - so tað, ið loyvt er at selja í Føroyum, eisini kann framleiðast í Føroyum. Men kortanei, sigur tingið. Johan Dahl sigur, at hann torir ikki at skera ígjøgnum á hesum øki, tí tað setir samgonguna í vanda.

Hetta er ilt at skilja, tó at vit á hesum stað ikki skulu mótmæla hesi broytingini hjá Johan Dahl. Men at hetta skal til fyri at stytta bíðiraðirnar fríggjadag, man tað ikki vera ein sannleiki við modifikatiónum? Fyrstu árini hevði Rúsan opið fríggjakvøld til klokkan 19. So bleiv hetta broytt - kanska lænt hugskot frá peningastovnum, at opið skuldi vera leingi hósdag. Her var neyvan hugsað um kundan. Men um vent varð aftur til hesa skipan, so varð trupulleikin við bíðiraðunum helst loystur.

Formaður Sambandsfloksins á tingi kom í gjár við mótmæli og kravdi, at landsstýrismaðurin broytir kunngerðina aftur. Enn einaferð síggja vit okkara óbúnu politisku skipan í einum nøtuhylki: Handlað verður populistiskt, tí formaðurin hevur sína serligu støðu í rúsdrekkamálum: »Tað burdi ikki verið til«. Vit kunnu so bara taka hattin av fyri landsstýrismanninum, sum púra greitt vísir slíkum kravi aftur. Landsstýrisfólkini umsita, løgtingsfólkini gera lógirnar.

**Sosialurin**

## Eru vit millum ringastu umhvørvissvín?



ANNIKA OLSEN
Landsstýriskvinna í innlendismálum

Tað var ógvuliga harmiligt at lesa grein í Sosialinum 16. mars »Millum ringastu umhvørvissvín«. Blaðmaðurin hevði ikki ómakað sær nóg væl at lýsa málið úr fleiri sjónarhornum. Tað verður sagt í greinini, at blaðmaðurin hevur roynt at fáa fatur á mær til eina viðmerking, men mær vitandi hevur blaðmaðurin hvørki ringt til mín ella til Innlendismálaráðið fyri at fáa eina viðmerking til greinina. Tí kenni eg tað sum mína skyldu at skriva hesa blaðgrein fyri at lýsa okkara síðu av málinum.

Í tíðindagreinini stendur skrivað, at Føroyar standa langt aftan fyri hini Norðanlondini og ES, og verður eitt nú Ísland brúkt sum dømi. Í greinini skrivar blaðmaðurin, at Ísland skerjir sítt útlát við 20% í mun til 1990, meðan Føroyar bara skerja 10%, um vit umrokna hetta til 1990 sum støðisár. Blaðmaðurin gloymir bara eina týdningarmikla millumrokning, nemliga at Ísland slapp at hækka sítt útlát við 10% í Kyotoavtaluni. Leggja vit tølini fyri Ísland saman við niðurskurðin hjá Føroyum, so standa Ísland og Føroyar á jøvnum, við tað at londini bæði reelt spara 10% í mun til 1990 sum støðisár. Sostatt standa vit ikki aftan fyri okkara íslendsku grannar. Tó er tað rætt, tí veðuraftan fyri Norra, sum er heimsins førandi tá ið tað kemur til at skerja útlátið av veðurlagsgassi, men hetta ger ikki Føroyar til heimsins største umhvørvsissvín.

Í mun til ES er støðan í Føroyum ikki so ring, sum blaðmaðurin vil vera við. Bróðurparturin av tí niðurskurði, sum 27 ES-londini gera, verður regulerað í einari kvotaskipan. Allur stóríðnaður hjá ES er partur í kvotaskipan, sum er skipað við keyp og sølu av CO2 kvotum. Hendan kvotaskipanin hevur í seinastuni verið undir hørðum atfinningum, tí tað er komið undan kavi, at tað er komin stór peningalig spekulatión í hesa skipan. Harumframt ber eisini til hjá ES, umframt øðrum londum, at fáa góðskrivað niðurskurð fyri íløgur í viðarvøkstur, tøkniliga menning í orkuskipanir í menningarlondum o.a. Hesir møguleikar, sum gera tað lættari hjá londunum at rokna seg til ein niðurskurð í útlátinum, kallast fyri »offsets«. Ein skipan, sum loyvir einum landi at rokna átøk, sum eru gjørd í øðrum londum, við í sín nationala niðurskurð. Ein kann seta spurnartekin við, um tað er rætt ella skeivt at gera brúk av tílíkum skipanum, og góðskriva hetta sum eina nationala skerjing av CO2 útlátinum. Globalt sæð er tað kanska rætt, tí veðurlagstrupulleikin er globalur og má loysast í øllum heimsins londum. Í Føroyum gera vit ikki brúk av »offsets« møguleikum. Okkara mál er fyrst og fremst at minka okkara heimliga útlát. Føroyska málið um at minka útlátið við 20% í 2020 skal røkkast við nationalum niðurskurði, uttan brúk av góðskrivingarmøguleikum. Hetta fremur gjøgnumskygni í okkara átøkum. Fara vit at gera brúk av »offsets«-skipanum er ætlanin, at hesin niðurskurður skal koma afturat verandi máli um 20% niðurskurð í heimliga útlátinum.

Tað er sera harmiligt, at vit í Føroyum eru so ófør at sláa hvønn annan í heysin við, at vit eru umhvørvissvín og óambitiøs, tá ið onnur kring okkum rósa okkum fyri eitt gott og ambitiøst arbeiði. Hetta kom fram undir veðurlagsráðstevnuni, har eg á fleiri pallum fekk høvi at greiða frá veðurlagspolitikki Føroya við sera positivari móttøku, ikki minst undir sjálvari ráðstevnuni í Bella Centrinum, har vit á einum væleydnaðum Side eventi fingu varpað ljós á Føroyar, føroyskan veðurlagspolitikk og varpað ljós á havið. Eisini valdi danski veðurlagsmálaráðharrin, Lykke Friis, at umrøða ambitiøsa føroyska veðurlagspolitikkin í sínari COP15-røðu. Í løtuni verður arbeitt í tøttum samstarvi við danir um at fráboðað UNFCCC føroyska tekstuppskotið, sum vit fingu semju um við danir undir veðurlagsráðstevnuni.

Eg má viðurkenna, at politiskt hevur man ikki gjørt nóg nógv við veðurlagsøkið fyrr enn nú, og tí fegnist eg um, at vit í Føroyum nú hava átikið okkum politiska ábyrgd á veðurlagsøkinum og sett ambitiøs mál at minka um okkara heimliga útlát. Hóast niðurskurðurin í Føroyum neyvan fer at loysa tann globala veðurlagstrupulleikan, so er tað umráðandi, at vit vísa medábyrgd og innlima okkum í alheimssamfelagið heldur enn at standa uttanfyri. Við at halda áfram at skerja útlátið av veðurlagsgassi gera vit okkum samstundis minni heft at oljuni, sum dagliga er ein hóttan ímóti okkara vinnulívi og búskapi sum heild. Vit hava við einari breiðari politiskari semju tikið fyrsta stigið tann rætta vegin, og vónandi fara vit at seta okkum enn hægri mál í framtíðini á veðurlagsøkinum, sum bæði gagnar umdømi føroyinga og ger okkum sterkari búskaparliga.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.